VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk. Sólglottar, men eisini ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið hósdagin:
Fleyr til gul av norði, um kvøldið frískar hann vindin av landsynningi. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Skrið ella stormur av landsynningi og regn. Um kvøldið nakað minni vindur av eystri og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av landsynningi, sum hækkar upp í landnyrðing og regn. Sunnudagin minkar hann vindin av landnyrðingi til lot av ymsum ættum og turt. Hitin millum 6 og 10 stig.

Bestu gevarar í norðanlondum

Enn ber til hjá fólki at hjálpa Reyða Krossi Føroya at hjálpa

Fyribils úrslit av innsavningini hjá Reyða Krossi vísur, at roknast kann við, at hvør føroyingur hevur goldið 8 krónur í bússurnar, sum fólk kring landið hava borið runt síðan fríggjadagin

INNSAVNAN
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Umboð fyri Reyða Kross Føroya ganga í hesum døgum hús úr húsi at savna inn pening til neyðhjálp. Og higartil hevur úrslitið verið gott.

Av tí at veðrið var so vánaligt leygardagin, var ikki komið so langt í Havnini, og tí hava fólk gingið í Havn mánakvøldið, og halda fram í kvøld og mikukvøldið.

Sagt verður frá Reyða Krossi Føroya, at tey, sum hava hug at hjálpa, kunnu møta í Reyða Krossi, inngongdin í Vágsbotni, klokkan 19.00.

Kanska fáa vit enn fleiri pengar til neyðhjálp, sigur Reyði Krossur í tíðindaskrivi.

Innsavnanin hevur annars gingið framúr væl higartil, og fyribils uppteljing vísir, at hvør føroyingur hevur latið átta krónur í bússurnar, og tað er met í Norðanlondum. Til samanlíkning kann upplýsast, at úrsliti íð Danmark var um 2,80 krónur og í Finlandi um 4 krónur fyri hvønn íbúgva.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	1
Nuuk	2
Qaqortoq	6
Ammassalik	3
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	10
Lerwick	13
Aberdeen	18
London	20
Tromsø	--
Bergen	14
Oslo	--
Stokkhólm	14
Keypmannah.	19
Helsinki	15
Moskva	13
Berlin	21
Warzawa	20
Kiev	21
Bukarest	22
Paris	22
Madrid	24
Róm	24
Malorca	20
Athen	24
Malta	25
Tunis	26
Beijing	26
New Dehli	34
Bangkok	32
Jakarta	32
Sydney	18
New York	23
Miami	31
Los Angeles	19
Meksikobýur	20
Panama	25
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	10

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, 986 hPa. við Føroyar fer spakuliga í landnyrðing eystan.

Komandi nátt:
Lágtrýstið eystan fyri Føroyar fer í landnyrðing. Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og grynnist.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 03/10 kl. 06⁰⁰ – 04/10 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/09 kl. 06⁰⁰ – 01/10 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 169,1 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

28. september Mánin longst frá jørðini
4. oktober Fullmáni
11. o ktober Seinna kvarter
13. oktober

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
6. okt	08:32	20:55	07:32	19:55	07:47	20:10	10:32	22:55	11:32	23:55	06:47	19:10	05:47	18:10	08:47	21:10	09:47	22:10	08:17	20:40	09:32	21:55
7. okt	09:19	21:45	08:19	20:45	08:34	21:00	11:19	23:45	-	12:19	07:34	20:00	06:34	19:00	09:34	22:00	10:34	23:00	09:04	21:30	10:19	22:45
8. okt	10:11	22:38	09:11	21:38	09:26	21:53	-	12:11	00:45	13:11	08:26	20:53	07:26	19:53	10:26	22:53	11:26	23:53	09:56	22:23	11:11	23:38
9. okt	11:05	23:32	10:05	22:32	10:20	22:47	00:38	13:05	01:38	14:05	09:20	21:47	08:20	20:47	11:20	23:47	-	12:20	10:50	23:17	-	12:05
10. okt	-	12:00	11:00	23:42	11:15	23:57	01:32	14:00	02:32	15:00	10:15	22:57	09:15	21:57	-	12:15	00:47	13:15	11:45	-	00:32	13:00